Tíðindir frá Amnesty Intenational:

# 20. august 2003 - Amnesty fordømir bumbuálop á ST

Amnesty International fordømir bumbuálopið í gjár móti ST-høvuðsskrivstovuni í Bagdad, har í minsta lagi 20 fólk lótu lív, teirra millum ST-sendimaðurin Sergio Vieira de Mello.

Álopið er ræðuligt og óskiljandi. At venda sær móti sivilu høvuðsskrivstovuni hjá ST kann bara føra til afturstig fyri neyðuga og sera týdningarmikla humanitera arbeiðið hjá ST at tryggja mannarættindi fyri irakska fólkið. Tankar okkara eru við øllum, sum vóru á staðnum undir álopinum, við ST-starvsfólkum, familjum og vinum teirra, sigur Amnesty í tíðindaskrivi.

**19. august 2003 - Amerikanska stríðið móti yvirgangi**

»Tað hevur elvt til stúran, at USA hevur tikið sær fleiri rættindi í sambandi við tað amerikanska »stríðið móti yvirgangi«. USA hevur gjørt eina eyka rættarskipan, har tey útinnandi hava rætt til at handtaka, avhoyra, skuldseta og stevna mistonkt inn fyri rætt« sigur Amnesty International í sambandi við tað seinastu frágreiðingini hjá felagsskapinum.

Alt ov ofta hava onnur gjørt tað sama sum USA, við tað at tey hava tosa um eitt »stríð móti yvirgangi«. Á henda hátt hava tey roynt at koma uttanum fleiri bindingar í sambandi við grundleggjandi meginreglur fyri mannarættindi og altjóða humanitera lóggávu.

Í frágreiðingini heitir Amnesty International á stjórnir kring heimin at tryggja, at virðingin fyri mannarættindarmeginreglunum framhaldandi verður kjarnan í teirra leitan eftir rættvísi og tryggleika.

Frágreiðingin setur ljós á støðuna hjá útlendsku fangunum í amerikonskum varðhaldi á Guantánamo herstøðini á Kuba og á tí amerikonsku herstøðini í Bagram í Afganistan, sum í yvir eitt ár hava fingið noktað at hava samband við familju og at fáa løgfrøðliga hjálp.

»Uppáhald um ágang og tilvildarligar handtøkur, langar isolatiónsfongslingar, píning og avhoyringar uttan hjálp frá verja og hóttanir um órættvísar rættargongd við hernaðarrætt eru á hvørjum ári í frásøgnum hjá amerikanska State Department um mannarættindi í øðrum londum« sigur Amnesty International. »Nú verða somu ákærir fluttar fram móti amerikonsku stjórnini í samband við teirra »stríð móti yvirgangi«.

Samrøður, ið Amnesty hevur havt við nøkur teirra ið eru leyslatin av Guantánamo, vátta tað, sum Amnesty hevur óttast frá byrjan - at korini sum heild og hættirnir ið verða nýttir – merkja, at tað verða framd brot á mannarættindini.

Støðug uppáhald um píning og vantandi atgongd hjá óheftum mannarættindarfelagsskapum og sakførarum, sum kunnu almannakunngera teirra upplýsingar, samanborið við at amerikanska hugsanin, um hvat er verður mett at vera ómenniskjanslig og eyðmýkjandi viðferð, ikki samsvarar altjóða allýsing, hevur gjørt at Amnesty International stúrir nógv fyri viðferðini av teimum, ið eru í amerikanskari varðveitslu.


## Politistur

### Eitt arbeiði við avbjóðingum

Politiið er eitt av stóru arbeiðsplássunum í Føroyum. Her hevur tú møguleikan í fullan mun at brúka tínar fakligu royndir og tínar persónligu eginleikar í einum sjálvstøðugum arbeiði við nógvum avbjóðingum og møguleikum at mennast.



*Høvuðsuppgávan hjá politinum er:*

- At vera sjónligt og skapa tryggleika og trygd fyri borgaran og samfelagið
- At fyribygja, at ósemjur, ófriður og kriminalitetur íkemur
- At fara eftir, kanna og uppklára framdan kriminalitet
- At tryggja, at galdandi reglur vera hildnar og fyribyrgja, at vanlukkur henda

Politiið hevur til dømis ein høvuðsleiklut í arbeiðinum at fyribyrgja kriminalitet – ikki minst millum børn og ung.

*Grundarlagið fyri politiarbeiðinum er virðingin fyri rættartrygdini hjá borgaranum.*

### Eitt arbeiði allan sólarringin

Arbeiðið hjá politinum verður gjørt í tøttum samstarvi í politistaliðnum millum einstøku politistarnar og politistøðirnar.



Her er eitt gott samanhald, og arbeiðið byggir á kunnleika til og nýtslu av førleikanum hjá einstaka politistinum fyri at røkka felags málum. Sum politistur ert tú altíð ein partur av liðnum – um tú ert til arbeiðis ella um tú hevur frí. Atlitið til borgaran og samfelagið er allatíðina í miðdeplinum, og tú veitst ongantíð frammanundan, hvat dagurin ella náttin bjóðar.

### Løn og útbúgving

Longu frá fyrsta degi sum politistur í royndartíð fært tú eina kappingarføra løn. Harafturat fært tú pensión og ymisk ískoyti fyri tænastu á skiftandi tíðum. Royndartíðin er 3 ár. Aftaná tað fært tú – um tú ert egnaður til politiarbeiðið– fast starv sum politistur.

### Menning og karriera

Sum politistur hevur tú góðar møguleikar fyri eini karrieru. Politiið hevur eina røð av serskeiðum – og so eru eisini leiðaraskeiðini fyri politistar, sum hava hug at arbeiða við leiðslu. Harafturat er stór trygd í starvinum og møguleikar at fáa arbeiði innan ymsar deildir ella aðra staðni í landinum.



**Ynskir tú at vera við?**

Vit seta eingi formlig krøv um útbúgving ella lívsroyndir fyri at søkja starv hjá politinum. Men vit leggja dent á tínar fyritreytir at verða ein góður politistur, sum kann loysa uppgávurnar hjá politinum í samsvar við reglur og virðir í samfelaganum og við virðing fyri einstaka persóninum og rættindum hansara.

Vit vilja fegin seta fólk í starv, sum ymisliga umboða føroyingin við atliti til sosialt og mentunarligt støði – og vit ynskja eitt hóskandi býti millum kvinnur og menn.

*Treytir sum skulu vera loknar, áðrenn tú søkir:*

- Tú ert fyltur 21 ár
- Tú hevur føroyskan/danskan heimarætt
- Tú hevur góða heilsu, vanliga hoyrn og vanliga litsjón
- Tú hevur koyrikort til persónbil

**Meira kunning**

Tey, ið ynskja meira at vita, finna hesar upplýsingar á okkara heimasíðu www.politi.fo og www.politi.dk. Á tí seinastu ber til at royna egnan kunnleika í mun til nakrar av upptøkuroyndunum. Í avgreiðsluni á politistøðini í Havn (má-frí millum kl. 9 og 15) fæst eisini kunning.

**Umsóknir kunnu sendast inn alt árið, og verða upptøkuroyndir eftir tørvi. 4 politistar skulu setast í 2004. Umsóknarfreistin til hesar upptøkuroyndirnar er 1. september 2003.**

Føroya Landfúti
Jónas Broncksgøta 17
Boks 3018
FO-110 Tórshavn
Tlf. 35 14 48 - Fax 35 14 49
Heimasíða: www.politi.fo


## Hondó live í Norðurlandahúsinum




Hvussu ljóðar tónleikur hjá teim, sum eru tónadeyv og uttan stev? Tá íslendingurin Halldór Arnar Úlfarsson, nevndur Hondó, vildi føra fram tónleik við vinfólki, mátti kann kappast við musikkvideo. Til hann fann uppá undarliga ljóðførið Dórafonina, á enskum The Dorophone. Dóri, sum navnið bendir á, er eyðknevni fyri Halldór. Í Dansistovuni í Norðurlandahúsinum fer hann at knýta sýna fram video og afturvið spæla uppá egnu Dorofonina.

Tiltakið er leygardagin hin 23. august frá klokkan 16 til 17. Ókeypis atgongd.



# Krevja at oljutangarnir verða fluttir úr Havnini




*Oljutangarnir á Viðarnesi í Havn skulu nú flytast út úr Havnini. Býráðið fer at vísa oljufeløguum á eitt økið inni á Sundi at byggja nýggjar tangar á*

**Tórshavnar Býráð fer nú at áleggja Shell og Statoil at taka oljugoymslurnar á Viðarnesi niður og at byggja nýggjar tangar inni á Sundi**

OLJUDÁLKING
*Áki Bertholdsen*

– Nú er nóg mikið tosað um oljudálking í Havn. Nú má okkurt gerast!

Heðin Mortensen, formaður í byggi- og býarskipanarnevndini í Tórshavnar Býráð, sigur, at nú má okkurt ítøkiligt gerast fyri at royna at basa trupulleikanum við oljudálking á Havnarvág.

Og eitt lið í hesum arbeiðnum verður at flyta oljugoymslurnar á Viðarnesi úr býnum.

– Býráðið fer nú at áleggja oljufeløgunum, Shell og Statoil, at flyta oljugoymslurnar úr býnum, sigur Heðin Mortensen.

Hann sigur, at farast skal undir hetta arbeiðið beinanvegin og at býráðið nú fer at samráðast við oljufeløgini um eina sámuliga tíðarfreist fyri, nær goymslurnar skulu verða fluttar.

Hvussu langt skotbrá,

ikki siga, men hann sigur, at tað er greitt, at farast skal undir arbeiðið nú og at stíður skal ikki koma í.

Og tað verða oljufeløgini, sum koma at bera kostnaðin av flytingini.

Hann sigur, at umsitingarliga er onki í vegin fyri at flyta tangarnar, tí oljufeløgini hava ongan sáttmála um økið við tað at Býráðið hevur ikki viljað longt hann.

Formaðurin í býggi - og býarskipanarnervndini sigur, at býráðið fer at vísa oljufeløgunum á eitt øki inni á Sundi, har tey kunnu byggja sær nýggjar goymslur.

Hann veit væl, at hetta loysir ikki allan trupulleikan við oljudálking á Havnarvág, tí nógv av dálkingini stendst av mistøkum, tá ið skip bunkra.

Men tað er eisini staðfest, at ein partur av dálkingini stavar frá goymslunum á Viðarnesi og tann partin av trupulleikanum ætla vit at loysa við at flyta goymslurnar.

– Ein onnur orøk til at býráðið vil hava tangarnar fluttar, er, at tað er ikki rætt at hava stórar oljugoymslur mitt í høvuðsstaði okkara. Tað standa nógv hús og tað er nógv ferðsla rættiliga tætt við tangarnar. Ikki

beint við og tað haldi eg er rættiliga óheppið.

### Gamalt og uppslitið

Heðin Mortensen sigur, at ein orøk til tey mongu óhappini er uttan iva, at oljutangarnir á Viðarnesi eru bæði gamlir og uppslitnir.

– Teir elstu tangarnir eru eru eini 70 ára gamlir og onkrir av teimum eru so illa farnir, at feløgini hava ikki loyvi at fylla meiri í teir enn eitt vist og tað er verri enn so at teir kunnu fyllast.

Garður er bygdur rundanum goymslurnar, sum skal forða fyri at olja rennur út natúruna, skuldi eitt óhapp hent. Men okkurt óhapp, sum er hent, vísir, at garðurin kann ikki metast at vera tættir og tí uppfylla teir ikki sítt endamál.

– Harumframt er eisini ivasamt, um hellan undir tangunum er tøtt, og tískil er vandi fyri, at olja seyrar niður gjøgnum helluna og síðani á sjógv.

Heðin Mortensen sigur, at tað tískil er ivasamt um trygdin ímóti eini álvarsamari umhvørvisdálking, av einum óhappi á Viðarnesi, er nóg góð.

Hann leggur afturat, at av tí at oljugoymslan á Viðar-

isverndarlógin, eru hon ikki umfatað av umhvørvislógini og krevur sostatt heldur ikki umhvørvisgóðkenning.

### Flytast inn á Sund

Heðin Mortensen sigur, at tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin hjá Tórshavnar Kommunu, mæla tískil til at býráðið tekur stig til, at oljugoymslurnar verða fluttar á annað hóskandi stað í kommununi.

Og tað økið, sum býráðið hevur at vísa á, er Inni á Sundi.

Málið hevur verið til viðgerðar í heilsu- og umhvørvisnevndini og hon tekur undir við tilmælinum. Málið hevur eisini verið fyri í byggi- og býarskipanarnevndini og hon tekur somuleiðis undir við tí.

Heðin Mortensen sigur, at nú skal umsitingin gera eina ætlan fyri, hvussu økið Inni á Sundi kann skipast, tá oljutangarnir eisini verða har og so skal málið leggjast aftur fyri nevndina.

**Fakta**

### Oljudálking í tølum

Í greinini um at flyta oljutangarnir hjá Shell og Statoil á Viðarnesi út úr Havnini, inn á Sund, nevnir Heðin Mortensen, at ein partur av teirri oljudálking, sum tey hava stríðst við á Havnarvág nú í langa tíð, stavar frá sjálvari oljugoymsluni á Viðarnesi.

Her eru nøkur av óhappunum:

• 15. mai 2000 kom hol á ein goymslutanga hjá Shell á Viðarnesi, og einir 7.500 litrar av gassolju seyraðu niður í fylluna.

• Í august-september 2001 fór rørleiðingin hjá Statoil og Shell til »gomlu« bunkringsstøðina á vestaru bryggju at leka og ein ókend nøgd av gassolja seyraði niður í fylluna og út á sjógv.

• 29. januar 2003 var leki á einum ventili hjá Statoil, og ein ókend nøgd av gassolju rann á sjógv.

• 5. juni 2003 fór ein ventilur á nýggju bunkringsstøðini á Viðarnesi og einir 11.200 litrar av gassolju fóru á sjógv.

• Harumframt hava verið fleiri oljudálkingar í sambandi við, at skip hava bunkrað frá bunkringsstøð og frá oljubilum.